# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25.09.23 |
| Mál nr.: | 23/18649 |
| Málsviðgjørt: | JS |
| Ummælistíð: | 26.09.23 til 26.10.23 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## býti av inntøkum frá veiðigjaldi og tøkugjaldi millum kommunurnar

Við heimild í § 12 a í løgtingslóg nr. 77. frá 5. mai 2021 um veiðigjøld (Veiðigjaldslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023 og § 2 b í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023, verður ásett:

*Býti av inntøku frá veiðigjaldinum*

**§ 1.** Inntøkur frá veiðigjaldinum sbrt. § 12 a í løgtingslóg um veiðigjald fella til ta kommunu, sum heimstaður skipsins í føroyskari havn er skrásettur sbrt. § 5, stk. 4 í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum.
*Stk. 2.* Kemur skipið undir annan heimstað, fella inntøkur frá veiðigjaldinum til nýggja heimstaðin frá tí 1. í mánaðinum aftaná, at broytingin er skrásett.

*Býti av inntøku frá tøkugjaldinum*

**§ 2.** Inntøkur frá tøkugjaldinum sbrt. § 2 b í løgtingslóg um tøkugjald verða býttar millum kommunurnar eftir lutfallinum av býtinum av partafelagsskatti til kommunurnar frá fyritøkum og samtøkum í alivinnuni fyri annað árið frammanundan.

*Útgjald*

**§ 3.** Parturin hjá kommununum av inntøkunum frá veiðigjaldinum og tøkugjaldinum verður goldin kommununum so hvørt hesi fella til gjaldingar.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2024.

Fíggjarmálaráðið, xx. oktobur 2023

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason